# Fyrsta fløgan frá Proclaim

Leingi hevur verið bíðað eftir fløguni hjá Proclaim. Og nú er hon umsíður komin. Proclaim gav hesa vikuna út fløguna við heitinum Grateful við 11 sangum, og sum limirnir í bólkinum sjálvir hava gjørt. – Vit hava roynt at havt greiðar tekstir, sum millum annað at staðfesta, at Gud er til og at hann ynskir at frelsa tann einstaka, sigur forsangarin í bólkinum, Bjartur F. Johannesen. Hinir limirnir í bólkinum eru Jens Súni Hansen, trummur; Bárður Reinert Poulsen, bass; Pauli Reinert Poulsen, guitar og Jákup Justinussen, tangentar. Fløgan, sum er útgivin av Heimamissiósnforlagnum, fæst kring alt landið og kostar 169 kr.



# ORCA gevur fløgu út

Í dag kom spildurnýggj fløgu- og DVD-útgáva út á føroyska marknaðin undir heitinum »ORCA-Livandi oyða«. Útgávan hevur 11 spor; live-tilfar eins væl og elektroniskt viðgjørt og remixað tilfar í samstarvi við Third Eye Foundation, Deadverse/ Oktopus, Bookworms og Com-Data. Á DVDnum eru videoløg, ein stuttur dokumentarfilmur um verkætlanina og live-upptökur frá konsert í fjósinum Innan Glyvur gamlaárskvøld 2005. Tað er plátufelagið TUTL, sum gevur út. Sambært heimasíðuni orca.fo er ORCA helst tann mest primitiva, bygdasliga, bóndaliga og samstundis mest há-tøkniliga, globaliseraða og stórbýarkenda føroyska tónleikaverkætlanin higartil.

# Skuldi verið skjótt at loyst trupulleikan

**Samráðingar verða nú ímillum ES og Føroyar um at seta ein ES skipan í gildi í Føroyum, so at skip, sum ES ikki hevur góðkent, eisini kunnu leggja veiðina upp í Føroyum**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm visti ikki av, at hetta var ein trupulleiki og hann fær ikki annað enn harmast um, skuldi tað víst seg, at hetta fer at kosta føroyskum fyritøkum ordrar fyri milliónir*

- Í Januar mánað verður fundur ímillum Føroyar og ES um at seta eina skipan í gildi, sum ger, at tað ber til her á landi at avgreiða skip, sum ES ikki hevur góðkent.

Tað sigur Arni Poulsen, aðalstjóri í vinnumálaráðnum.

Í vinnumálaráðnum eru tey greið yvir, at tað er ein trupulleiki, at vit ikki fáa avgreitt skip, sum ES ikki hevur góðkent, í Føroyum.

Tað, sum manglar, er at seta eina skipan, sum er nevnd "Traces", í gildi fyri Føroyar.

Tað er ein elektronisk eftirlitsskipan sum ger, at tað ber til at fylgja eini vøru, hvagar hon fer.

- Fyri at avgreiða hesi skipini, skulu vit verða partur í hesi ávísu traces skipanini og í løtuni arbeiða vit við at fáa hana setta í gildi í Føroyum.

Arni Poulsen sigur, at í hesum sambandi hevur Vinnumálaráðið biðið um fund við ES í januar um at seta hesa skipanina í gildi í Føroyum.

- Tey formligu viðurskiftini skulu vera í lagi og vit duga ikki at síggja at nøkur viðurskifti skuldi verið til hindurs fyri, at hetta verður sett í gildi í Føroyum. Men tað skal greiða fáast á fundinum við ES í Januar.

Men nú er hetta ein gamal trupulleiki, hví er málið ikki loyst langt síðani?

- Tað er ein spurningur um raðfestingar og nú er stundin so komin til at raðfesta hetta málið, sigur Arni Poulsen.

Higartil hava vit ikki arbeitt við at fáa hetta í rætt lag, leggur hann afturat.

Vinnan sigur, at nú er so seint, at vandi er fyri, at tey missa ein marknað, sum tey hava brúkt fleiri ár upp á at fáa til Føroya?

- Tað vóna vit ikki fer at henda, er stutta viðmerkingin úr Vinnumálaráðnum.

Men kundi Heilsufrøðiliga Starvsstovan so ikki framhaldandi avgreitt skipini upp á gamlan máta, til tann nýggja skipanin varð sett í verk?

- Tað hevur hon so ikki mett, at hon kann og tað eigur hon heldur ikki at gera, tá ið tað ikki er í samsvari við reglarnar.

## Farið afturvið

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur, at tað er ikki fyrrenn beint nú, at hann er greiður yvir, at hetta er ein trupulleiki.

Tí hevur hann heldur onga forkláring uppá, hví tað hevur gingið so langa tíð at fáa málið loyst.

Landsstýrismaðurin er samdur í, at tað ber ikki til hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at hava eitt virksemi, sum ikki er í samsvari við sáttmálan við ES og tí kann hann ikki mótmæla, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan gevst at avgreiða hesi skipini.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann kann ikki annað enn harmast um, at tað hevur drigið so langt út, at loysa hendan trupulleikan, at vandi nú skal vera fyri, at fyritøkur missa eina vinnu á gólvið, sum tey hava brúkt fleiri ár upp á at byggja upp.

Átti ikki onkur í skipanini at havt fangað, at hetta er ein trupulleiki?

- Tað er sjálvsagt, so tað kann eg ikki annað enn vera samdur í. Men eg fái ikki sagt annað enn, at tað er ikki meiri enn ein mánaði síðani, at eg var varugur við trupulleikan og eg bað beinanvegin um at fáa hann loystan.

Bjarni Djurholm sigur, at hann kann tískil ikki annað enn vóna, at málið verður loyst sum allar skjótast.

Men hvat sigur tú so til, at tað nú er drigið so langt út, at fyritøkur eru í vanda fyri at missa ein markað á gólvið, sum kastar milliónir av sær.

- Tað er heilt beklagiligt og eg fái ikki sagt annað enn at eg havi ikki vitað av hesum trupulleikanum og samstundis kann eg ikki annað enn vónað, at hann verður loystur beinanvegin.

# Hetta mátti halda uppat

**Tað er ikki rætt at arbeiða uttanfyri reglarnar, sigur Bárður Enni, stjóri á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit hava arbeitt eftir einum holi í lógini og tað er ikki rætt.

Bárður Enni er stjóri á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, men hann vil ikki siga so nógv til atfinningarnar frá vinnulívinum í Sosialinum í gjár.

Bæði stjórin á Samskipum, stjórin á Faroe Ship og stjórin á Faroe Cold Stores í Vági, fýltust í Sosialinum í gjárá, at Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Vinnumálaráðnum.



*Vit kunnu ikki halda fram við virksemi, sum er ímóti sáttmálanum við ES, sigur Bárður Enni, stjóri á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni*

Bárður enni sigur í stuttari viðmerking, at tað er eitt hol.

- Og tað er ikki rætt at arbeiða uttanfyri tær reglar, sum eru, so einfalt er tað, sigur Bárður Enni.

- Tað, sum er farið fram, er ikki í samsvari við reglarnar hjá ES og tað kunnu vit ikki blíva við at liva við, leggur hann afturat.

Hann sigur eisini, at tá ið ES var í Føroyum á kunningarvitjan í fjør, gjørdi ES umboðini greitt, at tað, sum fór fram, var ikki eftir reglunum.

Annars vísir hann á, at nú eru tríggir mánaðir síðani, at vinnan fekk boðini um hetta og tí heldur hann ikki, at talan er um at kappa á stokkinum.

Ein atfinning er, at tá ið tey kæra til Vinnumálaráðið, er tað Peter Østergaard, sum avgreiðir málið og hann arbeiðir á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni

- Tað skuldi ikki havt nakran sum helst týdning við málið, tí hóast hann arbeiðir her, er hann eisini virkandi Landsdjóralækni og hann hevur als onki havt við hetta málið at gera yvirhøvur. Annars hevur hann onkuntíð áður verið í hesi støðuni og tað hevur hann avgreitt fyrimyndarliga, sigur Bárður Enni.

## FAKTA

Í 2001 gjørdu Føroyar og ES avtalu um marknaðeftirlit fyri at gera tað lættari hjá føroyskum fyritøkum at útflyta til ES.
Men í hesum sambandi hava skip frá triðja londum havt eina serliga støðu.
Kortini hevur tað altíð borið til at avgreidd vørur frá skipum, sum ikki eru góðkend í ES.
Hetta er eitt virksemið, sum hevur kastað nógv av sær hesi seinastu árini, tí tað eru ikki fá skip, sum ikki eru góðkend frá ES, sum gjøgnum árini hava lagt fiskavørur av ymsum slagi upp í Føroyum, her tær eru goymdar, til tær eru fluttar víðari, har tær skulu.
Men tann 14. september í ár boðar Heilsufrøðiliga Starvsstovan frá, at hon ikki longur kann avgreiða skip, sum ikki eru góðkend í ES og at alt slíkt virksemið tískil má halda uppat.
Hetta gjørdi Heilsufrøðiliga Starvsstovan uttan nakra ávaring ella fráboðan frammanundan.
Hetta er komið ógvuliga illa við hjá teimum, sum fáast við slíkt virksemi.
Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur boðað vinnuni frá, at orsøkin til at nokta at avgreiða skipini, sum ikki eru góðkent í ES, er, at vit í Føroyum ikki hava eina skipan, ið er nevnd Traces, og sum er ein elektronisk skipan, ið ES brúkar til at hava samskiftið ímillum tær ymsu marknaðstøðirnar.